gult cyan magenta svart



# Havnin skal skína

*Gamla slagorðið fyri ein reinari høvuðsstað er eisini galdandi á ólavsøku, men tað er tó ikki bara sum at siga tað*




*Hóast myndin er tikin fyri nøkrum árum síðani, so munnu likkurnar framhaldandi hava eins góðar dagar á ólavsøku. Nóg mikið er at taka av hjá teimum*
***Mynd: Kalmar***

JÁKUP MØRK

Hjá teimum flestu, sum komandi dagarnar eru støðd í Havn, er ólavsøkan ein høgtíð. Arbeiði og tað, sum har hoyrir til, er aftarliga í tonkunum, og fólk nýta heldur tíðina til at hugna sær saman við familju og kenningum.

**Eingin fríløta**

Ymiskt er, hvussu hesar frí- og hugnaløtur verða nýttar. Felags fyri tey flestu er tó, at ein stórur partur av degnum verður nýttir uttandura, har tey vála oman og niðan eftir havnargøtum. Seinastu gestirnir á gøtuni eru heldur ikki farnir heim, fyrr enn sólin er komin væl og virðiliga undan kavi, men tá er reingerðin hjá høvuðsstaðnum langt síðani farin til verka.

Á vegadeildini hjá kommununi er nevnliga einki, sum eitur at hava frí á ólavsøku. Tvørtur ímóti er hetta tíðin, har mest er at gera hjá teimum.

Tey, sum fara ein gongutúr tíðliga ólavsøkumorgun, vilja eisini síggja ein reinan høvuðsstað, og tað gera tey eisini. Hóast hann um náttina hevur verið alt annað enn reinur.

**Við fullari ferð**

Tað er nevnliga ein øgilig rúgva av ruski og óruddi, sum sløðist á gøtunum, tá ólavsøkugestirnir hava hildið sær á gleim. Ja, somikið nógv, at neyðugt er við eyka manning hesar dagarnar. Eyka manningin er samansett av seks skúlanæmingum, sum á hendan hátt kunnu vinna sær nøkur eyka oyru í summarfrítíðini. Jørmund Olsen, sum er arbeiðsformaður hjá vegadeildini, sigur, at tað stendur ikki á at fáa fatur á hesum. Eisini leggur hann dent á, at hóast talan er um ungt fólk, sum eisini vil sleppa í býin á ólavsøkuni, so er uppmøting teirra stak góð, hóast onkur kanska er eitt sindur moyrur seinasta dagin.

Jørmund greiðir frá, at teir í alt eru einir 17 mans til arbeiðis hesar dagarnar, umframt at fýra feiðibilar og tveir smáir lastbilar eisini verða nýttir í arbeiðinum.

Byrjað verður longu um fimm tíðina, og so verður ikki helmað í, fyrr enn allur býurin skínur. Arbeiðið er skipað soleiðis, at bilarnir byrjað í hvør sínum enda av býnum, og so verðru koyrt oman móti Miðbýnum, har allir hittast. Framman fyri bilarnar ganga menninir so og feiða út av gongubreytini, og skjótt gongur. Longu um 10-11 tíðina er býurin aftur til reiðar at taka ímóti ólavsøkugestum.

**Fløskurok**

Einki er at taka seg aftur í, at hjá nógvum verður ólavsøkan nýtt til at fáa sær eina rívuliga kenning og kanska meira afturat.

Onkrum skal kenningin eisini koma frá, og at nógvar fløskur sløðast í býnum, er eisini ein avleiðing av hesum.

Jørmund sigur, at teir plaga at savna fløskurnar saman, og eftir ólavsøkuna verða hesar so seldar. Pengarnir,s um teir fáa fyri hetta, verður so nýttir til eina útferð fyrsta vikuskiftið eftir ólavsøkuna, so eisini reingerðin kann halda sína ólavsøku.

Onkuntíð hava teir verið í Vestmanna. Suðuroyggin er eisini vitja, meðan pengarnir okkurt árið eru nýttir til ein góðan bita á onkrari matstovu. Alt hetta kostar sjálvsagt, men fíggingin er so longu fingin til vega. Í fjør ár var talan um 6.800 kr., sum teir fingu í fløskupengum.

# Smúkkur skulu til

*Tey, sum selja silvur til føroysku klæðini og prýðislutir annars, hava úr at gera undan ólavsøkuni*

JÁKUP MØRK

Onkur skal kanska hava seinastu knapparnar til føroysku klæðini, annar vil kanska hava nýtt prýði at festa í oyra o.s.fr.

**Í evstu løtu**

Felags fyri nógv av hesum er í øllum førum, at nú er um at vera seinasta freist, um alt skal fáast til høldar til hesa ólavsøkuna.

Og tað eru veruliga nógv, sum bíða til seinastu løtu við at keypa. Í øllum førum, um vit skulu trúgva handilsfólkunum, sum selja hesar vørurnar.

Hans Korsgaard, sum er ein av eigarunum í 3'aranum í SMS, sigur, at tey sjálvandi selja nógvar smúkkur undan ólavsøkuni.

-Tað skuldu vit helst eisini gjørt hesa tíðina, leggur hann afturat. Hann sigur, at talan er um alskyns slag av smúkkum. Sjálvandi eru nógv, sum vilja ogna sær seinastu silvurlutirnar til føroyska búnan, men at talan eisini er um prýði av øllum møguligum øðrum slag.

**Nógv frá Anker Eli**

Kanska mest forvitnisligi parturin av vørunum hjá 3'arunum munnu vera smúkkurnar, sum føroyingurin, Anker Eli Petersen, hevur designað.

Hesar komu á marknaðin fyri fáum mánaðum síðani, og hóast teir ikki hava gjørt serliga nógv við at lýst við hesum, so letur Hans sera væl at søluni.

-Vit hava so at siga ikki skrúvað rættuliga upp fyri marknaðarføringini av hesum enn, men kortini eru lutirnir longu nú sera væl umtóktir, sigur Hans. Hann leggur afturat, at tað heldur ikki bert eru føroyingar, sum tykjast áhugaðir í hesum prýðislutum.

Gjøgnumgangandi motivið í røðini er norrøna gudalæran, og hetta hevur viðført, at stórur áhugi er fyri hesum uttanlands, greiðir Hans frá. Eitt nú nevnir hann amerikanarar: Tey hava jú so at siga ongan siðsøguligan arv at vísa á, og tí verða tey ofta rættuliga fasinerað, tá tey so bera eyga við slíkar lutir, sum jú umboða ein týðandi part av okkara søgu, sigur Hans.

Ein lítil trupulleiki í hesum sambandi er tó, at faldararnir, sum 3'arin lat gera til røðina, enn ikki eru komnir til landið. -Serliga eru tað útlendsku ferðafólkini, sum vilja lesa eitt sindur um evnið, men hetta hava vit so loyst, við at biðja um navn og bústað, og síðani verða faldararnir sendir, tá vit hava fingið teir, sigur Hans.

**Smíða dag og nátt**

Niðri við Kongabrúnna, har Niels L. Arge heldur til, hava tey eisini úr at gera.

Ja, so nógv, at tað stendur á hjá teimum at evna nóg mikið til av knappum, spennum og øðrum: -Vit klára tó at arbeiða tað mesta undan, men tað eru tó eisini fleiri, sum fáa eitt nei, tí tey koma ov seint við bíleggingini av vøruni, sigur Regin Arge av verkstaðnum.

Hjá Niels Arge evna tey silvurið til sjálvi, men Regin vil tó ikki siga, hvussu nógv silvur tey nýta til ólavsøkuna, ella hvussu stórur partur av samlaðu nýtsluni talan er um. Hann viðgongur tó, at talan er um ein góðan part, ella sum hann málber seg: -Tað er akkurát sum at hava eina eyka jólasølu.



*Eftirspurningurin eftir smúkkunum, sum Anker Eli Petersen hevur teknað, er sera stórur, verður sagt úr 3-aranum*

gult cyan magenta svart



# Pan Fisk og Vestlax við avtalu í komandi viku

*Sambært norskum miðlum keypir Pan Fish helvtina av Vestlax í komandi viku*



*Savnsmynd*

JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Vestlax og Pan Fish sum høvdu avtalu kláru fyri fáum vikum síðani, men sum landstýrið havnaði, eru nú við at koma á mál við eini nýggjari avtalu.

Sambært nýggja samstarvinum millum Vestlax og Pan Fish rokna eigararnir við at framleiðslan kann økjast við millum 20 og 30 prosentum.

Upprunaliga vildu Pan Fish og Vestlax leggja saman, men aftaná at føroysku myndugleikarnir søgdu nei have partarnir leita eftir eini loysn sum passar føroysku lóggávuni.

Stjóri í Vestlax, Súni Durhuus, sigur sambært norska blaðnum Aftenposten, at teir nú hava eina loysn sum ikki skal vera brot á føroyska lóggávu. Nýggja avtalan umfatar eisini virksemi hjá Vestlax í Danmark. Sambært Aftenposten selja Súni Durhuus og Jógvan Durhuus 50 prosent av partabrøvunum í Vestlax til norska Pan Fish. Hetta verður gjørt fyri at fáa betri atgongd til marknaðin og fyri at fáa eitt betri samstarv við Laksaaling, sum Pan Fish eigur gjøgnum sítt felag Norway Seafarms.

Vestlax og Laksaling hava umleið 25.000 tons av laksi í ringunum í Føroyum. Partarnir vóna at hetta kann økjast til millum 45.000 og 50.000 tons um tvey trý ár. Einasta forðingin fyri at náa málinum skal vera møguleikarnir at fáa hendur á smoltum

# Koyra samdøgrið runt

*Onkur má syrgja fyri, at vit, sum taka okkum av løttum á ólavsøku, kunnu sleppa úr einum staði í annað*

STEFAN Í SKORINI

Hýruvognsførarar hava sum vera man sera nógv um at vera á ólavsøku, tí at alt fólkið skal onkursvegna flytast runt í býnum. Tey, sum ikki hava hug at brúka apostlarnar til flutning, mugu tí heita á hýruvognarnar.

Allir hýruvognarnir í Havn fara at koyra alla ólavsøkuna á tamb, so at okkara ólavsøka kann vera so góð sum gjørligt.

Aage Johannesen, stjóri á P/F Bil, sigur, at allir 21 bilarnir hjá teimum verða tøkir alt samdøgrið. Onkuntíð verður tørvur á svøvni, men tá tekur ein avloysari yvir.

**Eingin ólavsøka**

Hjá hýruvognsførarunum verður eingin verulig ólavsøka sum so vegna arbeiði. Tað verða ikki tey nógvu tiltøkini, sum førararnir sjálvir fara til, men kanska teir fáa ein avloysara, meðan kappróður ella fótbóltsdystur er, so at teir um ikki annað fáa ein lítlan part av ólavsøkutiltøkunum við.

Aage Johannesen sigur eisini, at vanliga er eingin trupulleiki av rúsaðum kundum, og at fólk flest eru væl vand.




*Hesir fara at koyra samdøgrið runt fyri tey, sum av góðum grundum lata bilin standa*

## Størsti søludagur

Á Restorffs Bryggjarí hava tey bryggjað niðurfyri til ólavsøkusøluna. Størsti søludagur á árinum var í gjár, dagin undan tjóðarhátíðini, og dagurin var væl fyrireikaður.

Dagin undan ólavsøku selja tey á Restorffs Bryggjarí einari 20 ferðir so nógvar kassar av øli sum aðrar dagar á árinum. Næststørsti søludagur er síðsti dagur undan jólunum.

## Í vælferðartíðum verður meira drukkið

RÚNAR RESITRUP

Nógvir eru mátistokkarnir, ið kunnu geva okkum eina hóming av, hvussu vælferðin í Føroyum hevur tað.

Ein týðuligt tekin er blanka nýggja stálið á vegunum, sum í kreppuárunum vóru fyltir av litfarnum og rustaðum blikkdósum á hjóli.

Eitt annað eru húsaprísirnir og eitt triðja er mongdin av øli, ið fólk drekka.

Farnu árini hava tey á Føroya Bjór upplivað, at tey selja umleið tíggju prosent meira øl fyri hvørja ólavsøku í fer framvið.

– Fólk hava fingið meira pening, og fólkatalið er hækkað. Tey keypa meira av øllum, eisini av øli, siga tey av Føroya Bjór.

Tað bar ikki, nú undan ólavsøkuni, til hjá Føroya Bjór at meta um samlaðu søluna á hesi hátíð, tí størsti søludagurin er altíð 27., og hann var ikki farin framvið, tá blaðið fór til prentingar.

